# Tað verður torført at koma til eitt úrslit

**Samráðingarnar ímillum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið um nýggjan sáttmála eru byrjar, men formaðurin í Starvsmannafelagnum væntar, at tað verður torført**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Gunnleivur Dalsgarð sigur, at samráðingarandin er positivur, men hann væntar, at tað verður torført at koma til semju*

Sáttmálasamráðingarnar ímillum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið um nýggjan sáttmála, eru byrjaðar.

Nakrir fundir hava verið og hildið verður fram komandi dagarnar.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum sigur, at enn eru tey ongan veg komin, men hann sigur, at samráðst verður í einum positivum anda.

Kortini væntar hann, at samráðingarnar verða torførar.

Vil ikki siga so nógv um samráðingarnar, ella, hvat Starvsmannafelagið hevur kravt.

– Men vit kenna øll útspælið frá landsstýrinum og tað er, at ongin lønarhækking skal vera.

Samstundis hevur landsstýrið boðað frá, at einhvør lønarhækking skal takast inn aftur við sparingum, tí útreiðslurnar til lønir skulu ikki hækka á komandi fíggjarlóg.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at undir slíkum umstøðum verður tað torført at koma til eitt úrslit, tí skal lønin standa í stað, merkir tað í veruleikanum, at keypiorkan lækkar av tí at prísirnir fara uppeftir alla tíðina.

Sostatt merkir tað at lønin ikki skal hækka í veruleikanum at lønin lækkar og tað hevur Starvsmannafelagið ongan hug til at góðtaka.

Landsstýrið boðaði eisini frá, at peningur fer ikki at verða settur av á fíggjarlógini fyri næsta ár til møguligar lønarhækkingar.

Men tað órógvar ikki formannin í Starvsmannafelagnum.

– Tað plagar lansstýrið ongantíð at gera, so tað er ikki øðrvísi enn vanligt, sigur hann.

Landsstýrið hevur øll árini sagt, at verður ein ávís upphædd sett av á fíggjarlógini til lønarhækkingar kann tað fatast sum ein ábending tilfakfeløgin um, hvat Landsstýrið er til reiðar at góðtaka av lønarhækkingum.

# Smyril fær nú eitt eitttal afturat navninum

**Smyril, sum nú er í sigling, verður torførur at selja, sigur stjórin á Strandferðsluni**

SUÐUROYARSIGLINGIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Smyril, sum nú siglur, fær nú navnabroyting. Ætlanin er at selja hann, men fyribils er lítil og ongin áhugi fyri at keypa*

Leygardagin verður nýggja suðuroyarferjan doypt, har hon verður smíðað á skipasmiðjuni í Spania.

Men tað er ikki tað stóra dulsmálið, at hon fær navnið Smyril.

Tað ber ikki til at Strandferðslan skal hava tvey skip, sum eita Smyril. Tað merkir tískil, at Smyril, sum nú siglur, má broyta navn.

Og tað skuldi hann gera í gjár, ella kanska í dag.

Sostatt fer Smyril, sum nú siglur, at fáa eitt eitttal afturat navninum og kemur hereftir at eita "Smyril 1".

Tá ið nýggi Smyril er komin í sigling, verður Smyril 1, lagdur og ætlanin er síðani at selja hann.

Landsstýrið hevur fyrr boðað frá, at miðað verður eftir at fáa eina millión amerikanskar dollarar fyri Smyril 1.

Tað eru góðar seks milliónir krónur.

Men Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsuni, ásannar, at hann verður trupul at selja yvirhøvur og tíansheldur fyri góðar seks milliónir.

Smyril 1 er gamal og illa slitin. Samstundis er oljan dýrkað nógv seinastu tíðina og tað ger alt samalt, at hann verður ógvuliga trupul at selja, í hvussu so er vissi hann skal lúka tey krøv, sum verða sett til ferðamannaskip um okkara leiðir.

Hann sigur, at í løtuni eru ongar samráðingar um at selja Smyril 1.

Tað hava verið nakrir fyrispurningar úr øðrum pørtum í verðini og onkrir av hesum fyrispurningum hava eisini ført til samráðingar.

Men allar hesar samráðingar eru dotnar niðurfyri aftur, tí teir áhugaðu keypararnir hava tikið seg aftur og í løtuni er ongin at samráðast við, sigur stjórin á Strandferðsluni.


## Netfyrisitari í Fíggjarmálaráðnum



**Starv sum netfyrisitari á gjaldstovuni er leyst at søkja**

Nú netfyrisitarin fer í annað starv á gjaldstovuni, so er starvið sum netfyrisitari leyst at søkja.
Netumsitingin veitir tænastur til stovnar í Fíggjarmálaráðnum, t.v.s. sjálvt ráðið, Føroya Gjaldstovu, Toll- og Skattstovu Føroya og Hagstovu Føroya.

Tann, ið settur verður, skal
- hava viðkomandi útbúgving og ella drúgvar royndir á økinum
- hava góð samstarvsevni
- megna at arbeiða sjálvstøðugt
- ikki vera bangin fyri at hugsa nýggjar loysnir
- tora at taka avgerðir.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum landstýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu vera Føroya Gjaldstovu, boks 2009, 165 Argir, í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. oktober 2005

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hilmar Augustinussen, fartlf. nr. 21 2261 sum er fúsur at svara spurningum.

Um starvið:
Tann ið settur verður skal, saman við netumsitaranum hava ábyrgdina av og umsita hesar skipanir og øki:
- postskipanini (MSExchange)
- proxi- og medi-, fílu-, MS-SNA -, navna - og WEB-ambætarum.
- brúkara- og atgongdarstýring
- brandmúri (Firewall)
- miðsavnaðum og miðfirraðum antivirus
- lan/wan við switchum
- backup
- dagføringum og viðlíkahaldi av skipanunum og forskriftum
- búsjett fyri netumsitingina
- samskifti við veitarar
- EDV – trygd sum heild

*Um netfyrisitingina:*
*Netfyrisitingin er skipað undir gjaldstovnuni. Omanfyri netfyristingina er eitt netráð. Í netfyrisitigini arbeiða umframt leiðaran ein persónur. Harafturat er eitt stavsfólk, sum í dagligdegnum starvast í tolli og skatti, knýtt til netfyrisitingina.*

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**


# Svimifelagið í Vági hátíðarheldur 25 ára føðingardagin

**Ì morgin og leygardagin verða ymisk tiltøk í svimjihøllini og í skúlanum, nú Vágs Svimjifelag fyllir 25 ár**

SVIMJING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vágs Svimjifelag fyllir 25 ár í ár.

Í tí samband, verða ymisk tiltøk í svimjihøllina í morgin og leygardagin.

Svimjararnir hjá felagnum fara at royna at svimja so langt sum gjørligt í eitt døgn. Tað skal alla tíðina verða ein svimjari í gongd og svimjarar í øllum aldri verða við. Hvør svimjari svimur so langt sum hann klárar í einar 10 minuttir og hvílir seg síðani til hann eigur tørn aftur. Hendan svimjingin verður skipað sum stuðulssvimjing, har virki, stovnar og privat kunna stuðla við eini ávísari upphædd fyri hvønn Kilometur, sum svomið verður.

Leygarmorgunin klokkan 10 verður móttøka í svimjihøllini og skúlaaulini, har Vágs Svimji-felag er vertur og har verður okkurt fyri bæði børn og vaksin. Ein framsýning av gomlum myndum og greinum er eisini á skránni.

Leygarmorgun ímillum kl. 8 og 12 er ætlanin at gamlir svimjarar í felagnum eisini skulu taka lut í 24-tíma svimjingini, eini 5 - 10 min. í part og felagið kundi tí hugsa sær at sæð so nógvar gamlar svimjarar sum gjørligt um at koma í høllina leygarmorgunin og hava svimjiklæði við.

### Komið fyri seg aftur

Tað var Jens Chr. Mortensen sum tók stig til at stovna felagið saman við øðrum tann 9. september í 1980. Vágs skúli hevði fingið svimjihøll árið fyri og tað hildu tey vera eitt gott høvi at stovna svimjifelag. Vágbingar fingu tá landsins bestu venjingarumstøður, við snøggu og sera góðu svimjihøllini við hyli uppá 25 metrar.

Felagið fótaði sær skjótt, og var frá 1982-90 millum tey sterkastu í landinum. Men frá 1991 til 1997 lá tað mestsum í dvala, men kom so fyri seg aftur. Síðani hevur tað gingið upp og niður, men tá Johan Martin Poulsen varð settur sum venjari seinasta heyst, kom rættulig vend í: Fyrstaliðið hevur tikið seg nógv fram, og fingið svimjarar í landsliðs-hópin. Og ímillum tey yngru er eisini veruliga farið at blóma, tí har hevur stór tilgong hevur verið, og venjingin er væl skipað, sigur felagið.